# Býlingadeplar

ALBERT ISFELD

arkitektur
Listi E



**Hvør býlingur skal hava sítt felagsøki at savnast um**

Seinastu áratíggjuni eru býlingahús bygd til tess at skapa eitt betri nærumhvørvi í ymsu býlingunum.

Nú eiga vit at taka næsta stigið, har ið vit gera ætlanir fyri at nýta økini kring býlingahúsini og møguliga húsini við, við tí endamáli at gera útiøkini nýtilig eisini til annað virksemi í grannalagnum.

Eisini kann verða bygt afturat býlingahúsunum ella nærhendis teimum, grovari bíligari bygningar ella skúrar, har ið t.d. familjur við børnum kunnu fara út at eta matpakka (pick nick) saman í frítíðini ella grannalagið kan savnast til felags grilling og alt møguligt annað.

Slíkar loysnir skulu so hvørt eisini byggjast inn í teir nýggju býlingarnar, og hetta eigur at verða tikið við í býarskipanirnar, so hvørt tær verða gjørdar. Viðarlundir skulu plantast í øllum býlingum.

Vit eru øll sera fegin um hagan, seyð og tílíkt, men alt hatta hoyrir heima uttanfyri bøgarðarnar. Okkum tørvar als ikki allar hesar forblástu lummar av haga inni í sjálvum býnum. Teir skapa einki umhvørvi, ongan fjálga, inni í býnum. Í býnum skulu vit byggja býarumhvørvi, men fjálgt og menniskjansligt, urbant og spennandi, men eisini grønt og livandi.

# Smyril Line og tíðarfreistin

## - Er revolvarin ordiligur ella er talan um luftwaffe?

ÁSA ANDREASEN



Sjálvsagt er hetta eitt torført mál, fult av kenslum. Sum eg havi skilt á málinum, so hevur kreditorurin, ein týskur banki, fráboða, at Smyril Line skal gjalda eitt gjald í morgin, 7. november, annars kemur Norrøna ikki aftur til Føroya. Hetta ljóðar ótrúliga løgi, at týski bankin ikki vil geva føroysku politikarunum 1-2 vikur at viðgerða málið í, so man ikki skal skunda hesa avgerð ígjøgnum. Neyvan hevur hesin týski kreditorurin ein spentan keypara á hondini í hesum tíðum... so um útlit eru at fáa pengarnar frá Føroya Landsstýri, so skuldi man hildið, at teir vildu bíða nakrar dagar, soleiðis at alt ikki verður hurra ígjøgnum, áðrenn nakar fær hugsa seg um.

Eg var tó glað at hoyra, at nakrir av politikarum okkara, eru eitt sindur skilagóðir - íhvørtfall í orðaskiftinum í Løgtinginum 6. november 2008, um uppskotið at spýta 30 mill. í Smyril Line.

Serliga var tað Magni Laksáfoss, sum hevði eina framúr góða røðu, ið legði upp til, at løgtingslimir og vit onnur, eiga at taka støðu til málið út frá fakta og ikki út frá kenslum. Vit eru øll góð við Smyril Line og Norrønu, men sjálvsagt er tað fakta, sum skal vera grundarlagið fyri avgerðini. Hví er so torført at fáa onnur at seta pengar í? Er tað realistiskt, at Smyril Line fer at kunna klára sínar skyldur framyvir, uttan at fáa meiri pengar úr Landskassanum? Og ikki minst, nú vit hava 30 mill. at brúka, burdu vit brúkt pengarnar til onnur endamál? Serliga var tað Jenis av Rana, sum hevði hendan seinasta spurningin frammi. Sera relevantur.

**Skuldi Smyril Line kanska bara fari á heysin**

Annars hevði tað kanska verið vert at tiki eitt kjak um, hvørt man átti at lati Smyril Line fari á heysin. Onkur hevði kanska vilja keypt Norrønu aftur, fyri ein bíligan penga, so bíligan, at tað kanska hevði borðið seg fíggjarliga, at havt eina rutu á Atlantarhavinum. Verandi íleggjarar missa álíkavæl heili 70% av sínum pengum, sambært verandi uppskoti, so tað er næstan líkamikið hjá teimum.

# Míni hjartamál

EILEEN SANDÁ

Ferðavinnusamskipari í Suðuroy
Valevni á lista A í Vági



Eg havi valt at stilla upp til býráðsvalið í Vágs Kommunu á Uttanflokkalistanum. Tað er hent so nógv keðiligt her suðuri og serliga í Vági hesa vikuna, men eg vóni, at tað fer at ganga hinvegin aftur skjótt. Eitt positivt er, at fólkatalið í Vági ikki er minkað seinastu 10 árini, sjálvt um tað er minkað í Suðuroynni sum heild hetta tíðarskeiðið. Vágur er ein deiligur býur, sum kann gerast uppaftur betri at búgva í. Við at standa saman skulu vit nokk klára okkum og koma víðari, her búgva nógv dugnalig og arbeiðssom fólk. Fíggjarstøðan hjá Vágs Kommunu er ikki so góð í løtuni, so ringt er at lova nakað. Eg vil tó nevna nøkur av mínum hjartamálum, sum eg vil arbeiða fyri, um eg verið vald í býráðið:

- At menna vinnulívið
- At menna ferðavinnuna
- At kommunan hevur neyva fíggjarstýring
- At kommunuskatturin ikki hækkar
- At fáa kommunala útjavning
- At systkinafrádráttur verður innførdur
- At nýggjur dagstovnur til børn verður bygdur
- At Suðuroy gerst ein kommuna, og at Vágur fær ein góðan sáttmála
- At kommunan gongur á odda við alternativum orkumøguleikum
- At vegur verður gjørdur til privat grundstykkir mitt í bygdini, so hesi kunnu brúkast
- At bygningar hjá kommununi fáa betri atkomumøguleikar, so fólk við breki sleppa inn
- At allir borgarar í kommununi fáa eins viðgerð og virðiliga viðgerð
- At ellisheimið og heimið fyri sinnisveik verða bygd
- At betra um gongubreytirnar í Vági
- At tey ungu fáa ungdómshús
- At mentan og ítróttur framhaldandi verða stuðlaði
- At 50 metra svimjihylur verður gjørdur, soleiðis at avlopshitin frá SEV kann nýtast
- At musikkskúlin fær betri karmar
- At kommunan framhaldandi fríðkar um býin

**Gott val!**
www.uttanflokkalistin.dk

# Bústaðarviðurskifti í Tórshavnar kommunu

UNN HENTZE



Tá vit tosað um bústaðir í Tórshavnar kommunu, er nógv at taka í. Eg meini, at Tórshavnar kommuna hevur havt ein, baði aktivan og sera óheppnan leiklut á hesum økið. Her vil eg nevnað trý av teimum tingunum, eg meti hava týdning.

Fyrst vil eg siga, at ein kommuna, eftir míni meining, hevur ábyrgd av, at allir íbúgvar hennara hava eitt stað at búgva. Í og við at vit hava heimleys í Tórshavnar kommunu, má mann siga, at hettar er ein ábyrgd ið kommunan ikki hevur livað upp til.

Síðani vil eg koma inn á grundstykkja prísin í Tórshavnar kommunu. Tað kann ikki góðtakast, at fólk fáa bjóðað grundstykki frá kommununi fyri ein prís, fyri síðani at (aftaná at tey hava tikið av og fingið lán), fáa at vita at prísurin er farin upp við meira enn 200.000 krónum. Og tað, at bankin fær boð um hvør ið fær bjóðað grundstykki frá kommununi, áðrenn viðkomandi sjálv fær boð er eisini nakað ið ikki eigur at henda.

Skúlaheim eiga at byggjast. Serliga um vit nú fara at byggja ein skúladepil í Marknagili, meini eg, at vit samstundis eiga at fáa hettar sett á skránna. Fólk sum lesa ella eru í læru hava ikki ráð til íbúðarprísirnir í Tórshavn, og eiga at fáa bjóða íbúð ella kamar á einum skúlaheimi.

Bústaðarviðurskifti eru eitt av mínum hjartamálum, og er so avgjørt nakað eg vil arbeiða fyri at betra um, verið eg vald inn í býráðið.

# Vit kunnu venda gongdini í Suðuroy

FINNLEIF GUTTESEN



Tað gerst við viljanum til nýhugsan, og við einum brennandi hugi til at skapa umstøður, ið geva fólki trúnna á, at her í Suðuroy ber til at skapa sær eina innihaldsríka framtíð.

Størsta forðingin er, at í nógvum politikarum býr ein mótvilji ímóti at ásanna veruleikan, at tað gamla kann broytast og at vit mugu ganga nýggjar leiðir.

**Fátæk, tó rík**

Fleiri av valevnunum koma við háfloygdum tonkum og gyltum lyftum, samstundis sum borgarin undrast á, at tað sæst so lítið til ta met stóru peninganøgd kommunan hevur haft um hendi seinast árini.

Tvøroyrar kommuna er fátæk uppá pening, men rík uppá fólk. Dugnalig fólk, ið stríðast fyri seg og síni, so at tey kunnu skapa sær eina rímiliga tilveru í kommununi.

Men tá ið vit ikki afturrinda skuld í góðum tíðum, sum hesi seinastu 4 árini hava verið, er ilt at síggja nær vit skulu gera tað.

Tað kann ikki verða meiningin, at okkara barnabørn skulu svíða fyri fíggjarligt óskil.

**Skuldina burtur og so framá**

Skal tað eydnast okkum at verða ein sterk og góð kommuna, so er tað av allarstørsta týdningi at hava sum aðalmál at gerast skuldarfrí.

Tá hava vit neyðuga frælsi at raðfesta og fíggjarliga førleikan at halda lyftir.

Eg ivist ikki í, at flest øll á Tvøroyri vita hvussu støðan hjá kommununi er, og tí taka gylt lyftir og háfloygdar tankar við fyrivarni.

Tíðin til tey stóru lyftini er ikki komin enn, men tey lyftir vit geva, skulu vit eisini halda.

Vel tí eina trygga fíggjarliga gongd, fyri teg og tínar eftirkomarar.

**vel Finnleif Guttesen**

# Umhvørvi

FRANK JACOBSEN



Umhvørvið er komið undir alt størri trýst seinastu árini. Dálking og fyrilitaleys nýtsla av tilfeinginum hevur havt avleiðingar. Ein avleiðing sigst vera veðurlagsbroytingar.

Tórshavnar Kommuna eigur at ganga undan á umhvørvisøkinum, og eigur altíð at taka atlit til umhvørvið, tá t.d. bygningar skulu byggjast. Serliga í Týsklandi eru tey komin langt við at gera 0-orku hús, tvs, at tann orka, sum verður nýtt, er frá varandi orkukeldum, og nýtslan av orku er ikki størri enn húsið sjálvt klárar at framleiða.

Tórshavnar Kommuna eigur at orða ein orkupolitikk, sum ger mun fyri umhvørvið. Orkupolitikkurin skal vera galdandi fyri allar borgarar í kommununi, og skal kommunan ganga á odda.

Vilt tú hava ein, sum lurtar eftir tær? Vilt tú hava ein, sum arbeiðir fyri teg? So vel meg! Tú finnur meg á lista H.

Visti tú ikki tað? Sosialurin